## DAGSINS MEINING

# Brúkaragjøld og skattur

Ein skattalætti er á veg til borgararnar sambært samgonguni, og frøðast samgongutinglimir um hetta. Er hetta so tann stóri lættin tað verður gjørt til? Nei, tað skuldi bara manglað, at ein skattalætti kom, tí brúkaragjald omaná brúkaragjald er lagt á borgaran av sitandi samgongu, tí at endarnir á fíggjarlógini ikki rukku saman.

Gamaní, í mun til støðuna í dag er tað ein lætti, sum formaðurin í Búskaparráðnum eisini vísti á, men tað er ikki meir enn nakrir mánaðar síðani fíggjarlógin var samtykt, ið legði byrðar omaná fólk, ið mótvirka skattalættanum. Við øðrum orðum hevur hendan samgongan latið við einari hond og tikið aftur við hinari.

Brúkaragjald hevur man altíð havt í ein ávísan mun, eitt nú í samband við flutning, men ansast má eftir, at slíkt ikki tekur yvirhond. Tekur man brúkaragjald í ytsta konsekvens, so kann tað merkja, at tey, ið eiga børn, gjalda skúlarnar, meðan tey, ið eingi børn eiga, ikki gjalda til hetta. Eitt uppaftur meira ekstremt dømi um brúkaragjald, ið meira enn so finst í øðrum framkomnum londum er, at einstaklingurin ella hansara privata trygging noyðist at gjalda fyri skurðviðgerðir, sum eitt nú eina by-pass skurðviðgerð við tí úrsliti, at fólk, ið eru sosialt illa fyri, ikki hava ráð til slíka viðgerð.

Á slíkum økjum hava vit í Føroyum tíbetur enn eitt solidariskt samfelag, har frísk og røsk fólk gleðiliga gjalda í felag til rakstur av sjúkrahúsum og skurðviðgerðir til tey, ið skuldu verið so óheppin at fingið tørv á slíkum. Eitt slíkt solidariskt samfelag er ikki ein sjálvfylgja. Tí krevst at løgtingslimir og landsstýrismenn hugsa seg væl um, áðrenn teir loypa á leistum við at innføra brúkaragjald á ov nógvum økjum ella lata ávísum bólkum skattalætta útfrá beinleiðis tápuligum argumentum, sum til dømis at hesin bólkur slítur vegirnar minni enn onnur ella brúkar einans almennar tænastur so og so nógvar dagar um árið. Um slík argument verða góðtikin, so kann alt samfelagið álast sundur í serbólkar, har fólk, ið ikki hava koyrikort betala lægri skatt, og fólk, ið hava góða heilsu gjalda minni enn tey, við ringari heilsu o.s.fr.

Eitt samfelag við brúkaragjaldi født út í ytsta konsekvens er gott fyri tey, ið eru ung, frísk og hava góða inntøku. Í so máta er tað rættiliga einfalt, men vit vita jú, at nógvir aðrir bólkar eru til í samfelagnum, og heilsuna kunnu øll missa. Tí eigur brúkaragjald av almennum tænastum at verða avmarkað, og tá so Løgting ella Landstýri innføra økt brúkaragjald ella brúkaragjald, har einki var, so eigur tann vanligi skatturin at lækka.

Vandin er, at við ógvusliga blokkniðurskurðinum, so kunnu vit enda við bæði toppskatti og brúkaragjaldi, og eitt slíkt samfelag ynskir eingin sær.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarpolitikkurin mótvegis kommununum - íløgur ella rakstur?

**Eyðgunn Samuelsen**
*Klaksvíkar býráð*



Jógvan við Keldu, býráðslimur, hevur eina grein í vikuni um hesi viðurskifti, ið eg havi hug at gera nakrar viðmerkingar til. Støðan í dag í kommununum, eins og hjá landskassanum, er tann, at inntøkurnar eru nærum tvífaldaðar, og ístaðin fyri at hava kreppu hava vit nú ein búskap, har mestum ov nógv ferð er á, eftir mínum tykki.

Henda støða krevur ikki bert loyvi at gera íløgur ótarnað, sum Jógvan við Keldu rør uppundir, nei, hon krevur eisini, at vit hava eina umsiting, ið megnar at fylgja við og ikki eina kreppuumsiting, skorðin inn á bein, sum vit høvdu í nítiárunum.

Hjá Klaksvíkar Kommunu eru útreiðslurnar til umsiting øktar frá 6,4 mió í 2000 og til 8,8 mió í 2003. Hetta halda nógv kanska er ein ov stór øking eftir so stutta tíð, men frágreiðingin er, at vit byggja upp aftur eftir kreppuna og fáa nakrar funktiónir aftrat (sosiala deild) ið mugu til, fyri at umsita økta virksemið í einum nýmótans býi, nakað sum Klaksvíkin skal vera. Sosiala deild í Klaksvík bleiv sum kunnugt niðurløgd í ringastu krepputíð, har kanska einamest var brúk fyri henni.

**Raksturin av Klaksvíkar Kommunu**

Taka vit økingina í rakstrinum frá 2000 til 2001, ið var uppá 19%, var henda øking fyri ein stóran part nýtsla av tøkum peningi, uttan at tað var lagt upp fyri hesi øking í fíggjarætlanini. Henda gongd er ógvuliga óheppin, tí tað er ikki skipað, hvat peningurin verður nýttur til, men meira tilvildin ið ræður. Tey stóru sveiggini í nýtslu av penningi, bæði til íløgur og rakstur, hevur í fleiri ár ikki verið ein tilrættaløgd gongd í uppruna fíggjarætlanini.

Hesa óhepnu gongd, hava vit roynt at lagt upp fyri í 2003 við at leggja upp fyri øllum kendum útreiðslum, so avgerðin um at nýta tøkan pening verður tikin út frá eini heildarmeting og ikki útfrá, at tað økið, ið kemur fyrst og »manglar« pening, fær hann, og tað økið, ið kemur síðst, fær onki, tí tá er peningurin nýttur.

Vøksturin í útreiðslum í fíggjarætlanini frá 2002-2003 inniheldur lønarhækkingar, økt krøv til renovatión og øking av barnaansingini. Kanska Jógvan við Keldu kundi sagt okkum, hvørjar av hesum økingum eru óneyðugar økingar av rakstrinum, sum hann málber seg í greinini.

**Ìløgur geva eisini øking í rakstri**

Meinar Jógvan við Keldu, at vit ikki skulu gera íløgur í eitt nú barnaansingarstovnar, tí hetta virksemi økir um raksturin? Hesar íløgur viðføra jú eina øking av rakstrinum, men tað tykist sum menn hava lyndi at gloyma, at hetta eru økingar, ið eisini geva økta inntøku. At økja raksturin við barnaansingarplássum gevur inntøku, bæði við at foreldrini gjalda 30% av økingini og ikki minst økta skattainntøku, tí foreldrini sleppa til arbeiðis. Sjálvt vinnan rópar eftir barnaansing, tí uttan at henda er nøktandi, kann vinnan ikki virka. Haraftrat fáa foreldur, ið arbeiða, meira pening at keypa vørur og tænastur fyri, og tað økir so umsetningin hjá vinnuni, ið framleiðir hesar.

Gera vit bert íløgur í vegir og havnir, so er støðan ein onnur, tær økja kanska ikki beinleiðis raksturin. Tað sum hevur týdning, er at finna lutfalli millum íløgur í tann »harða« pakkan og tann sokallaða »bleyta« pakkan, tí ein býur, ið ikki hevur góð tilboð á skúla-, mentanarnar- og barnaansingarøkinum hevur onga framtíð, óansæð hvussu nógvar vegir og havnir vit gera.

**Íløgukarmurin í dag**

Trupulleikin við íløgukarminum í dag er, at hann ikki tekur hædd fyri tí uppsamlaða viðlíkahaldstørvinum hjá nógvum kommunum. Klaksvíkin forsømdi øll tey góðu árini í 80'unum at gera neyðugt viðlíkahald innan skúlaverkið, svimjihøllina og aðrar almennar bygningar, hetta tekur íløgukarmurin ikki hædd fyri. Tað, ið átti at verið vanligt viðlíkahald verður nú ein íløga, og tað tyngir íløgukarmin so nógv, at trupult er at finna pláss fyri neyðugum nýíløgum og harvið víðari útbygging av samfelagnum. Høvdu vit havt allar tær milliónirnar, ið eru nýttar til viðlíkahald av skúlum og umvælingum av svimjihøllini, so var neyvan nakar trupulleiki við íløgukarminum.

Eitt annað, ið eisini forðar íløgum, er kommunuskuldin. Tá ið ein kommuna sum Klaksvík má gjalda skuld aftur, ið er so stór, at í miðal 4. hvør skattakróna fer til at afturgjalda skuld, so má vera trupult at gera íløgur. Klaksvíkar kommuna hevur seinastu 4 árini goldið oman fyri 90 mío í rentum og avdráttum.

**Stýring av búskapinum - einasta gongda leiðin.**

Men óansæð um ongin íløgukarmur var, so hevði tað skapt búskaparligan ruðuleika um allar kommunnur kundu gjørt allar íløgur í senn. Vit síggja tað í dag, tann ferðin, sum í dag er á búskapinum ger, at tey arbeiði, ið verða boðin út, verða alt ov dýr, tí trýstið ella eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er ov stórur.

Mark er eisini fyri, hvat eitt øki sum Norðoyggjar klárar at útvega av arbeiðsmegi, í summar bar ikki til at fáa viðlíkahaldi av skúlanum á Ziskatrø framt, tí onnur stór arbeiði vóru í gongd, millum annað svimjihøllin og verkætlanin undir Kráarbrekku. Hetta sæst eisini av, at avseting í grunn liggur oman fyri 10 mió, tí vit megna ikki at gera alt í senn.

Einasta gongda leiðin er at gera langtíðarløguætlanir, har vit neyvt áseta, hvat skal gerast nær og hvussu hetta verður fíggjað. Kommunnunar eiga at samskipa sínar íløgur á tann hátt, at allar ikki gera stórar íløgur í havnir, men semjast um, at ein kommuna ger hetta, meðan hin kommunan ger onkra aðra íløgu, og at ein so nýtir fasilitetirnar hjá hvørjum øðrum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.






*Økisfundurin hjá Javna, sum hildin varð í Vágum týskvøldið var væl vitjaður*

*Mynd: Edvard joensen*

# Nógv er vunnið og meira eftir

**Á økisfundi, sum Javni helt í bygdarhúsinum í Miðvági týskvøldið, varð settur ein áhugabólkur at virka fyri einum sambýli til menningartarnað í Vágum**

MENNINGARTØRVUR
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** At vera menningartarnaður kann vera so mangt. samfelagið sum heild er tarnað í síni menning, vóru fólk samd um á økisfundinum hjá Javna í Miðvági týskvøldið.

Víst varð á fundinum á ymsar manglar, sum eru rættiliga eyðsýndir. Eitt nú tørvin á barna- og ungdómpsykiatri og tørvin á sambýlum og øðrum tilboðum til menningatarnað uttan fyri Havnina. Á fundinum varð stig tikið til at seta ein áhugabólk, sum skal kanna tøvrin á einum slíkum sambýli í Vágum og seinni arbeiða fyri at fáa tað upp at standa og virka.

Fundurin í Miðvági var væl vitjaður. Har vóru bæði avvarðandi, starvsfólk, sum hava eitthvørt tilknýti til fólk við serligum tørvi og kommunalpolitikkarar úr allari oynni. Fýra fólk sótu við eitt pallborð, og orðaskiftið var lívligt eftir framløgurnar.

Framløgurnar frá pallborðinum fevndu alt frá, hvussu tað er sum foreldur at fáa boðini um, at barn títt hevur brek. Hvar kommunulæknin er staddur í hesum sambandi. Hvat kann almannaverkið bjóða og gera í slíkum førum, eins og eisini fræ ttist eitt sindur um, hvat tey ymsu økini, í hesum førum Vágar, hava av tilboðum til hesi fólkini.

Livandi og skilliga greiddi Marjun í Kálvalíð úr Miðvági frá, hvussu tað sum foreldur í Danmark upplivdist at fáa at vita, at barnið hevur sjúku, sum fer at merkja tað fyri livið. Hvat gerast kundi, og hvat varð gjørt.

Almannaverkið og tað netverk, sum hartil hoyrir, er sterkt í Danmark. Men tey sannaðu, at í Føroyum treivst drongurin betri enn í Danmark, hóast danska almannaverkið gekk fyri at vera betri enn tað føroyska. Stóri munurin er tað persónliga netverki í Føroyum, segði hon. So tey fluttu til Føroyar frá góða danska almannaverkinum.

Ragnhild Dahl frá Almannastouvni greiddi frá, hvussu almannaverkið virkar í slíkum førum, og aftur varð staðfest, sum so mangan, at pengar og trongar arbeiðsumstøður eru ein stóru trupulleiki.

Elsa Dargit Davidsen, pedagogur úr Sørvági vísti á, at hóast nógv enn er eftir, eru kortini ótrúlig framstig hend á økinum. Bara tað, at føroyingar í dag viðurkenna hesi fólkini, er rímiliga nýtt.

– Skommin sum var av at hava ein menningararnaðan í bygdini, fyri ikki at tala um í familjuni, er ikki til meira. Næsta stigið er so at fáa teimum sømilig kor at liva og virka undir.

Marjus Dam, kommunulækni, kennir alla mylluna. Hann kundi bara staðfesta, at tað stendur als ikki so væl til her á landi. Segði seg hava verið út fyri at noyðast at leggja barn akutt inn á psykiatriska deild, tí eingin var at taka í móti barni, sum trongdi til sálarliga hjálp.

– Ein barnapsykiatari ella psykologur er í Føroyum, vísti hann á. Ikki tí at hann ikki hevði fingist, um bara biðið varð um hann. Men har er einki gjørt fyri tað, segði kommunulæknin í Vágum.

# Forboð móti at sláa børn

**Í legði Katrin Dahl Jakobsen vegna Javnaðarflokkin fram uppskot á ting um, at foreldur ikki longur skulu sleppa at sláa børn síni**

HARÐSKAPUR
*Eirikur Lindenskov*

Tað skal ikki longur verða loyvt foreldrum at sláa børn síni.

Hetta heldur Javnaðarflokkurin, og tí hevur Katrin Dahl Jakobsen vegna flokkin lagt fram á tingborð uppskot til ríkislógartilæli um avtøku av rættinum til likamliga at revsa børn.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at galdandi lóggáva í Føroyum heimilar í ávísan mun likamliga revsing móti egnum børnum.

Í Karnov Lovsamling frá 1995 bls. 3438 verður í viðmerking til revsilógarinnar grein 244 um revsing fyri vanligan harðskap sagt, at »det fortsat må antages at ville være former for legemlig afstraffelse af børn som led i opdragelsen, der ikke er strafbara eftir § 243«.

– Danir hava sett forboð móti likamligari revsing av børnum eins og Norðurlandaráðið mælti til í 1982. Í Svøríki settu tey úr gildi rætting til likamliga revsing av egnum børnum í 1979, í finnlandi í 1983 og í Noreg í 1987, sigur Katrin Dahl Jakobsen og mælir til, at hetta forboð eisini verður sett í gildi í Føroyum.

Hon sigur, at Javnaðarflokkurin heldur tað eisini verða rætt, at samfelagið við slíkari lógarbroyting ger greitt, at likamlig revsing av børnum verður ikki góðtikin.

– Umframt at boða frá eini almennari støðu til málið við tí fyri eyga at minka um harðskap í uppalingini, hevði hetta styrkt um støðuna hjá starvsbólkum, sum hava við børn og foreldur at gera. Her verður hugsað um heilsusystrar, lærarar, pedagogar, sosialráðgevarar, læknar, løgreglu og onnur, sum við einum klárum rættargrundarlagi kundu sagt bæði børnum og vaksnum, at ikki er loyvt at sláa børn. Tí hvussu skal t.d. ein lærari greiða einum barni frá, at tað ikki má sláa og vera harðligt, um so er, at hetta er vanliga talumálið í heiminum? spyr løgtingskvinnan.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at Javnaðarflokkurin heldur tað vera uppá hægstu tíð, at eisini vit taka við teirri menning, sum hóast alt er farin fram, og vísa, at eitt rættarsamfelag serstakliga verjir tey veikastu. Í hesum føri at javnseta børn við onnur, tá tað ræður um likamliga revsing.



*– Umframt at boða frá eini almennari støðu til málið við tí fyri eyga at minka um harðskap í uppalingini, hevði hetta styrkt um støðuna hjá starvsbólkum, sum hava við børn og foreldur at gera, sigur Katrin Dahl Jakobsen*